# Viðtøkur fyri P/F Firum

## Navn felagsins, endamál og heimstaður

§ 1

Navn felagsins er P/F Firum. Hjánavn felagsins er P/F Fiskaaling. Heimstaður tess er Við Áir, 430 Hvalvík.

§ 2

Endamál felagsins er:

- at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni
- at reka vinnuligt virksemi innan hetta virksemisøki og
- annað starv í hesum sambandi

## Partapeningur og partabrøv

§ 3

Partapeningurin er settur til kr. 4.300.000,00 - skrivað fýra milliónir tríhundrað túsund 00/100, býttur í partar á kr. 1.000 ella multipla av hesum til kurs pari.

Partabrøvini skulu ljóða upp á navn og verða skrivað inn í partabrævabók felagsins.

Eingi partabrøv hava framíhjárætt.

Hvør avhending av partabrøvum skal skilast til í bókum felagsins.

Partabrøvini kunnu frítt verða seld millum verandi partabrævaeigararnar í jøvnum lutfalli.

Partabrøvini eru ikki umferðarskjøl.

§ 4

Partabrøv felagsins kunnu mortificerast uttan dóm samb. teimum fyri ikki-umferðarskjølum galdandi reglum.

## Aðalfundur

§ 5

Aðalfundir verða hildnir Við Áir. Aðalfundur felagsins verður hildin, áður enn juni mánaður er úti.

Nevndin boðar við í mesta lagi 4 viku og í minsta lagi 14 daga ávaring hvørjum einstøkum partabrævaeigara til fundar við brævi til tann bústað, sum hann hevur latið skrivað inn í partabrævabókina.

Brævið skal innihalda fundarskrá við tilskilan um fundarstað og tíð.

Um uppskot, ið til samtyktar krevja serligan meiriluta, koma til viðgerðar, so skal hetta verða serstakliga tilskilað í fundarboðunum.

Uppskot frá partabrævaeigarunum skulu fyri at koma til viðgerðar á vanligum aðalfundi verða nevndini í hendi innan 1 mánað undan hvørjum aðalfundi.

Eykaaðalfundir verða hildnir eftir avgerð nevndar og/ella grannskoðarans ella aðalfundarinnar, ella tá ið partabrævaeigarar, ið eiga 1/10 av partapeninginum, skrivliga krevja tað.

Boðað verður til eykaaðalfundar innan 14 dagar eftir, at skrivligt krav er nevndini í hendi.

Í seinasta lagi 14 dagar undan hvørjum aðalfundi skulu til skjals á skrivstovu felagsins vera tilskilað dagsskrá og tey fullfíggjaðu uppskot, ið skulu verða borin fram á fundi.

Tá ið aðalfundur er, skal eisini ársroknskapurin við grannskoðaraváttan og stjórnar- og nevndarundirskrift vera til skjals.

§ 6

Á ársaðalfundi skulu fundarevnini vera hesi:

a) Val av fundarstjóra
b) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
d) Uppskot frá nevndini um, hvussu ársúrslitið skal verða nýtt.
e) Val av nevndarlimum
f) Val av grannskoðara
g) Uppskot frá nevnd ella partabrævaeigarum

§ 7

Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra. Hann kann vera nevndarlimur.

Fundarstjórin stýrir fundinum og ger av allar spurningar viðvíkjandi viðgerð av málum og atkvøðugreiðslu.

Allir partabrævaeigarar, ið atkvøðurætt hava, kunnu krevja atkvøðugreiðslu.

§ 8

Til at greiða atkvøðu krevst, at partarnir eru skrivaðir inn í partabrævabók felagsins undan aðalfundinum.

Hvør partabrævaeigari eigur eina atkvøðu fyri hvørjar 1.000,00 kr., hann eigur í partapeningi.

Atkvøðurættur kann vera framdur við fulltrú. Fundarstjórin avger gildi hennara.

§ 9

Á aðalfundi kunnu bert verða samtykt uppskot, ið standa á fundarskránni, og broytingaruppskot til teirra.

Mál til viðgerðar á aðalfundi verða avgjørd við vanligum meiriluta, uttan so at lógir ella viðtøkur felagsins krevja serligan meiriluta.

Fulltrúir at koma á hin fyrra aðalfundin hava gildi eisini á hesum seinna, tá ið tær ikki skrivliga eru afturkallaðar.

§ 10

Frásøgn frá tí, ið fer fram á aðalfundinum, verður førd í fundarbók, sum skal undirskrivast av fundarstjóranum og hjástøddum nevndarlimum.

## Nevnd og stjórn

§ 11

Felagið verður stýrt av eini á aðalfundi valdari nevnd, ið hevur millum tríggjar og átta limir.

Nevndarlimir verða valdir fyri eitt ár í senn.

Verður talið av nevndarlimum í árinum minni enn tríggir, við tað at ein ella fleiri fara burturúr, skal nevndin sum skjótast boða til eykaaðalfundar til val av nýggjum nevndarlimum.

Teir nevndarlimir, ið soleiðis hava tikið við, starva, til næsti ársaðalfundur er hildin.

§ 12

Nevndin, ið sjálv velur formann sín, hevur hægstu leiðslu í viðurskiftum felagsins.

Nevndin ásetur við starvsskipan greiniligari reglur fyri starvi sínum.

Frásøgn frá tí, ið fer fram á nevndarfundi, verður at føra í gerðabók, ið skal verða undirskrivað av øllum hjástøddum nevndarlimum. Á fyrsta nevndarfundi, ið hildin verður, eftir at roknskapurin er grannskoðaður, verður grannskoðarabókin løgd fram, og teir nevndarlimir, ið eru á fundi, skulu við undirskrift síni vátta, at teir hava gjørt seg kunnigar við tað, sum í henni stendur.

Nevndin setur ein stjóra at hava dagligu leiðsluna av felagnum.

Nevndin kann veita umboðsfulltrú.

§ 13

Felagið verður teknað av stjóranum saman við nevndarformanninum ella av allari nevndini í felag.

## Roknskapur og grannskoðan

§ 14

Á hvørjum aðalfundi verður ein ríkisgóðkendur grannskoðari valdur.

§ 15

Roknskaparár felagsins er frá 01.01. til 31.12.

Roknskapurin verður undirskrivaður av nevndini og verður áskrivaður av grannskoðaranum.

§ 16

Ársroknskapurin skal vera vandaliga uppgjørdur, soleiðis at hann greitt sýnir øll virði og allar skuldarbindingar, ið til eru, soleiðis at neyðurviligar avskrivingar verða gjørdar.

Soleiðis samtykt á aðalfundi við Áir tann 20. mars 2024

Sunnvør Klettskarð í Kongsstovu, formaður

Unn Vagnsdóttir Johannesen

Heidi Sofusardóttir Mortensen

Turið Mørkøre

Niels Winther

Sum stjóri í P/F Firum:

Jóhanna Lava Køtlum